# Í kvøld er John í Íslandi

**Ringo Starr, Sean Lennon og Olivia Harrison vóru hjástødd, tá Yoko Ono tendraði sína Friðarsúlu á Viðey við Reykjavík í gjárkvøldið**

MINNING
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

- Hetta er ein gáva til heimin frá John og Yoko og frá íslendsku tjóðini, segði Yoko Ono, einkjan eftir John Lennon, tá hon hevði tendrað ljósini, sum lýsa beint upp í loft og mynda ta bláligu Friðarsúluna.

- Nøkur okkara eru her á staðnum, onnur eru við okkum í huganum, og onnur eru í fongsli. Men tey eru eisini við okkum her í kvøld. Summi eru farin hiðani, men tey eru eisini saman við okkum í dag, segði Yoko Ono.

Millum teirra, sum vóru komin til Íslands til hátíðarløtuna, vóru Sean Lennon, sonur John og Yoko, gamli Bettles-trummusláarin Ringo Starr og einkjan eftir George Harrison, Olivia Herrison. Serliga Ringo var hugtikin av Friðarsúluni, og hann tók av fullum huga undir við einum kóri, sum sang kenda lagið ”Imagine” hjá Lennon.

- Eg kom higar bara fyri at síggja Friðarsúluna, og eg haldi, at hon er ótrúliga vøkur. Eg ivist ikki í, at John hevði verið fegin um súluna hjá konuni.

- Eg haldi, at Jonh er millum okkum. Hann er millum okkum í Íslandi í kvøld, segði Ringo Starr við blaðið Vísir.



*Yono Ono greiðir frá Friðarsúluni*

*Mynd: Vísir*


*Ringo Starr og Yoko Ono undir hátíðarløtuni á Viðey*
*Mynd: Vísir*


*Tær sterku ljósstrálurnar mynda Friðarsúluna*

*Mynd: Morgunblaðið*




# Richard Mortensen farin frá sum stjóri í FT Samskifti

FØROYA TELE
*Eirikur Lindenskov*

- Nevndin í FT Samskifti hevur avgjørt at seta nýggja leiðslu í felagnum, sum skal vera við til at tryggja samtakinum Føroya Tele eina nýggja felags kós frameftir. Richard Mortensen er í hesum sambandi í semju við nevndina farin úr stjórastarvinum, og nevndin í FT Samskifti fer nú at leita eftir nýggjum stjóra.

Soleiðis sigur Føroya Tele í tíðindaskrivi.

Samtakið Føroya Tele setir nýggja felags kós fyri móðurfelagið og dótturfeløgini, og í hesum viðfangi skal FT Samskifti, sum er eitt av dótturfeløgunum, hava nýggja leiðslu.

Richard Mortensen, sum hevur verið stjóri í FT Samskifti, síðani Føroya Tele var skipað sum samtak í 2005, er í hesum sambandi í semju við nevndina farin úr stjórasessinum. Samstundis verða marknaðardepilin og søludepilin í FT Samskifti lagdir saman.

Nevndin í FT Samskifti fer nú at leita eftir nýggjum stjóra. Kristian R. Davidsen, sum er nevndarformaður í FT Samskifti og samtaksstjóri í Føroya Tele røkir stjórastarvið, til nýggjur stjóri ella fyribilsstjóri er settur.

Samtakið Føroya Tele er skipað sum eitt móðurfelag og fýra dótturfeløg. Móðurfelagið nevnist P/F Telefonverkið, og FT Samskifti er dótturfelagið, sum hevur um hendi alla sølu av fjarskiftistænastum. Hini dótturfeløgini eru netfelagið, FT Net, Televarpið og Formula.fo, sum Føroya Tele fyri stuttum keypti meirilutan av.

Føroya Tele er í eini arbeiðstilgongd, har leiðslan leggur nýggjar ætlanir fyri alt samtakið, ið verða grundarlagið undir víðari menningini av Føroya Tele, sum framhaldandi verður fremst í framburðinum m. a. við áhaldandi at víðka heimamarknaðin út um landoddarnar.


*Richard Mortensen*